Polar Empress, sum hevur ligið fyri á Nólsoyarfirði og síðani á Skálafjørðinum er nú á veg til Vágs.

# Oljuinnrás í Vági

**Jan Müller**

20.10.2015 - 18:53

Oljan.fo

Loksins er oljuøldin komin til Vágs. Eitt av heimsins størstu og mest nútímans seismikkskipum, Polar Empress, sum seinastu vikurnar hevur ligið fyri akker fyrst á Nólsoyarfirði og síðani á Skálafjørðinum, hevur nú sett kós móti Vágs bygd. Avtala er gjørd við havnamyndugleikarnar í Vágs kommunu um, at hetta skipið umframt eitt hjálparskip, skal liggja við bryggju í Vági komandi tíðina, meðan bíðað verður eftir nýggjum arbeiðsuppgávum.

Oljan.fo veit ikki orsøkina til, hví skipið ikki hevur valt at brúka havnirnar í Havn og Runavík, men vit skilja, at reiðaríið hevur biðið Vágs havn um tilboð at liggja við bryggju har, og at tað hevur gjørt av at flyta suður.

Dennis Holm, borgarstjóri sigur við oljan.fo, at hetta eru sera góð tíðindi fyri Vágs kommunu, tí hetta er í veruleikanum úrslitið av einum áralangum uppsøkjandi arbeiði teir hava gjørt í sambandi við oljumessur bæði í Aberdeen og í Stavanger.

Við hesum sáttmálanum ber til at siga, at Vágur nú fær sín part av oljukøkuni, í hvussu er tann partin, sum hevur sambandi við at fáa útlendsk frálandsskip at brúka føroyskar havnir. Lesið meira um hesa fyri vágbingar og suðringar spennandi og góðu søgu seinni í kvøld.





